# AGANEVNDIN

**KÆRA 3/2018**

| *FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Kæra um ólógligan leikara í steypakappingardysti NSÍ-HB, 28. mai 2018** | |
| Deild: U21 menn | Hvør hevur reist málið: HB |
| Kapping: Steypakapping | Kæra móttikin: 30. mai 2018 |
| Møguligt brot framt: 30. mai 2018 | Kærugjald goldið: ja |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: ja |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: Ongar viðmerkingar |

**Úrskurður**

Aganevndin staðfestir, at tað er skjalprógvað við dómaraseðlum, at ungi NSÍ-leikarin hevur leikt 3 dystir sama leikumfar. Ungi leikarin var tí at meta sum ólógligur leikari í triðja dystunum, t.e. í steypakappingardysti hjá U21 móti HB mánadagin 28. mai. Niðurstøðan er, at NSÍ verður dømt at tapa dystin 0-3 sambært § 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt. Felagið kann kæra úrskurðin til Yvirkærunevndina.

**Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli**

HB kærir NSÍ fyri at hava brúkt sama unga leikara - yngri enn 21 ár - í 3 dystum sama leikumfar. Talan er um dystirnar:

- 26.05.2018 Víkingur-NSÍ 1.deild (leygardag)
- 27.05.2018 B36-NSÍ Betri deild (sunnudag)
- 28.05.2018 NSÍ-HB, U21 steypakappingin (mánadag)

**Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Vísandi til grein 2, 5 og 7 í agareglugerð FSF's, hevur Aganevndin málsføri at viðgera hetta mál.

**Fakta í málinum**

FSF-skrivstovan hevur kannað dómaraseðlarnar og váttað fyri Aganevndini, at ungi NSÍ-leikarin hevur leikt nevndu tríggjar dystir sama leikumfar.

2 dystir eru leiktir í landskappingini og 1 dystur í steypakappingini fyri U21 menn.

**Lógarverkið**

Sambært § 1, stk. 1 í Kappingarreglunum fyri fótbólt eru reglurnar galdandi fyri "allar dystir í føroysku lands- og steypakappingini".

Sambært § 1, stk. 3 kann Kappingarnevndin áseta "nærri reglur fyri kappingarnar í 4. deild menn, Old Boys, Old Girls, kvinnulið sum leika á hálvum vølli og yngru deildirnar upp til og við unglingadeildina og gentudeildina. Hesar kappingarreglur, sum kunnu víkja frá hesum kappingarreglum, skulu lýsast av Kappingarnevndini í seinasta lagi ein mánaða áðrenn kappingarbyrjan." Ongar serreglur eru gjørdar burturav fyri U21 menn.

# AGANEVNDIN

Sambært § 5 í reglugerðini fyri Løgmanssteypið er ásett, at “Hvar onki annað er tilskilað, eru tað tær til einhvørja tíð galdandi kappingarreglur F.S.F.'s ið eru galdandi.” Sama er ásett í § 5 í reglugerðini um Th. Dam & Co. Intersport steypið fyri unglingalið hjá FSF.

Sambært § 8, stk. 4 í Kappingarreglunum fyri fótbólt, verður fríggjadagur, leygardagur, sunnudagur og mánadagur roknaðir sum ein leikdagur og týsdagur, mikudagur og hósdagur, sum ein leikdagur.

Sambært § 8, stk. 3 kann leikari, sum ikki er fyltur 21 ár 1. januar í kappingarárinum, leika tveir dystir sama leikdag. Reglurnar í § 9 eru bert viðkomandi fyri flytan millum deildir móti endanum av kappingarárinum.

Sambært § 41 er ásett, at “Verður lið dømt at tapa dyst, verður málmunurin 0-3 roknaður.”

**Staðfestingar, metingar og niðurstøða**

Sambært § 1, stk. 1 og § 1, stk. 3 í Kappingarreglunum fyri fótbólt, eru hesar reglur galdandi fyri allar dystir í lands- og steypakappingingini – eisini tá talan er um U21 menn. Hetta verður eisini stuðlað av tilvísingum í ymsum reglugerðum fyri ymsar steypakappingarnar hjá FSF.

Aganevndin staðfestir, at tað er skjalprógvað við dómaraseðlum, at ungi NSÍ-leikarin hevur leikt 3 dystir sama leikumfar.

Ungi leikarin var tí at meta sum ólógligur leikari í triðja dystunum, t.e. í steypakappingardysti hjá U21 móti HB mánadagin 28. mai.

Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikara elvir til, at felag verður dømt at tapa dystin sambært grein 8, stk. 1, bókstav h í Agareglugerðini.

Niðurstøðan er, at NSÍ verður dømt at tapa dystin 0-3 sambært § 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

**Kæruvegleiðing**

Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann úrskurðurin um at NSÍ U 21 tapir dystin móti HB leiktur 28. mai við málmuninum 0-3 kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar eftir, NSÍ hevur móttikið úrskurðin.

**Staður, dagfesting og undirskrift:**

**Tórshavn 8. juni**

Anni á Hædd

**Anni á Hædd, forkvinna**

Aganevndin, ið viðgjørdi hesa kæru: Anni á Hædd, løgfrøðingur og forkvinna, Ken Nónklett, løgfrøðingur og næstformaður og Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi.